# Fremad-venjari til Brøndby

Peer F. Hansen, sum ikki fekk nýggjan sáttmála við Fremad Amager, skal sambært danska Ekstra-Bladet í starv hjá Brøndby. Har skal hann ætlandi venja eykaliðið hjá Brøndby. Tom Køhlert hevur verið venjari hjá eykaliðnum hjá teimum gulu, men síðani í vetur hevur hann eisini staðið á odda fyri besta liðnum, og tí hevur arbeiðsbyrðan verið dekan ov stór.



# GÍ roynir brasiliumann

Hóast flytingarvindeygað ikki letur upp fyrr enn 18. juni, so er ætlanin, at nýggi maðurin skal fáa pláss í hópinum alt fyri eitt. Fyrr í ár var nevnliga ætlanin, at Leandro Temeroso da Silva skuldi royndarvenja við GÍ. Ta ferðina gjørdist venjingin av ongum, men øll praktisk viðurskifti kring spæliloyvið vórðu kortini greidd, skilst.

Nú kemur spælarin so til Føroya, og so verður tað upp til hansara at sannføra GÍ-venjaran um, at hetta er maðurin, sum veruliga kann skora neyðugu málini fyri felagið.

Andreas Poulsen, formaður í GÍ, sigur, at da Silva er 23 ára gamal áleypari, sum áður hevur spælt við ymsum feløgum í Brasil og Venezuela.

HB-Skála 5-2 (2-1):

# Skálaverjan skrædnaði

*HB*

*Skála*

**Verjumistøkini vóru avgerandi, tá HB móti dystarenda fullkomuliga punkteraði Skála**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Obi fekk síni fyrstu Formula-mál í Skála-troyggjuni, men tað hjálpti lítið hjá Skála, sum tapti 5-2 fyri HB*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Byrjanin kundi valla verið verri hjá HB, sum enn eina ferð skuldi reisa seg eftir eitt tap, sum als ikki var partur av lærubókini.

Knappir átta minuttir vóru farnir, tá Levi Hanssen og Alexandur Johansen hegnisligа spældu HB-miðvøllin tunnan. Tá Slavisa Kaplanovic síðani sendi innlegg móti HB-málinum, misskiltu Rasmus Nolsøe og Maryn Dawid hvønnannan, og so hevði Obi púrsta tóm mál at rulla bóltin í.

Eitt var, at HB við hesum gjørdi útgangsstøðið undan dystinum verri. Annað var, at teir nærum løgdu upp til Skála at spæla júst spælið, sum teir orangjulittu hava verið so dugnaligir til seinastu umførini. Nevnliga at halda mótstøðuni frá møguleikum, fyri síðani at kontra við fullari ferð.

Á ein hátt eydnaðist hetta eisini hjá Skála. Tí restina av fyrra hálvleiki hevði HB sum so ikki teir stóru møguleikarnar. Men hóast skurðurin soleiðis eydnaðist, so doyði sjúklingurin, tí burtur úr ongum fingu vertirnir kortini tvey mál.

Tað fyrsta var av teimum heilt óneyðugu, tá Milic Curcic framdi eina deyðssynd við at dribla í verjustøðu. Royndin miseydnaðist, og so setti Tór-Ingar fulla ferð á, áðrenn hann fann ein blankan Rógva Jacobsen. Seinnu ferðina var talan um fríspark, sum serfrøðingurin á økinum – Rasmus Nolsøe – tók sær av. Hann hevði havt eina roynd í múrin undan hesum, men hesa ferð hevði bólturin sær onkursvegna útum múrin, áðrenn flata skotið fann meskarnar við nærmara stólpan.

## Merkt av villum

Eingin ivi er um, at frísparksmálið beint undan steðginum gav HB betri frið at spæla. Hóast tað tók sína tíð, áðrenn teir avgjørdu tingini eftir steðgin, so høvdu meistararnir fyri tað nógva fult tamarhald á støðuni.

Skála royndi í einstøkum førum at liggja framvið, men tað tóktist, sum var seinasti neyvleikin ikki til staðar. HB hótti hinvegin nakrar ferðir, og millum annað prógvaði Christian Høgni Jacobsen, at hann ikki hevur fingið marginalarnar við sær til høvuðsstaðin. Hesa ferð tá hann frekt royndi seg úr spískum, men bólturin tók undirsíðun av tvørtrænum.

Men við einum dundurskoti frá Jákupi á Borg tóktist HB fáa málið, sum avgjørdi dystin. Obi svaraði tó aftur fyri Skála, men spenningurin helt sær tó ikki serliga leingi. Aftur fekk Rasmus Nolsøe mál við frísparki, og hesa ferð var eingin ivi um, at Hans Jørgensen átti at hildið bóltinum. Og tá Skála verjan bara minuttin eftir heilkiksaði rangstøðufelluna, kundi Jákup á Borg seta punktum fyri málskjótingini. Ein málskjóting, sum gaman í kastaði sjey mál av sær, men har í øllum førum fýra – og kanska fimm – mugu roknast sum stórar verjuog málverjavillur.

## Sveiggini kosta

Fyri Skála merkti tapið, sum var teirra næsta á rað, at teir mest sum hava forspilt sær møguleikan at vinna upp móti heiðursmerkjastríðnum. Niðurflytingarvandin varð fingin nakað burtur við mongu stigunum, sum teir savnaðu frá fimta til níggjunda umfar, men meira enn eitt pláss miðskeiðis á stigatalvuni tykist talan nú ikki gerast um.

Og undir øllum umførum man tað geva nakað at hugsa um, at teir hesa ferð lótu fimm mál fara ígjøgnum. Seinastu seks umførini eru annars bert tvey av slagnum farin inn.

Hjá HB var talan »enn einaferð« um uppreisn. So er spurningurin, hvørt teir hesa ferð megna at halda støðinum. Gera teir tað, so eru tey fimm stigini upp til oddin ikki meira, enn gott er. Men skulu meistararnir vinna seg upp, skulu avrikini altso vera nógv meira støðug.

## Mistøk kosta altíð

Levi Hanssen hjá Skála var ikki nøgdur um úrslitið, sum teir høvdu fingið í Gundadali.

- Sjálvandi er tað ikki lætt, tá liðið fremur somikið nógv mistøk. Tá tú spælir á útivølli móti HB, so veitst tú, at hetta hevur tú ikki ráð til.

Júst slík mistøk hevur Skála annars lúkað burtur seinastu nógvu umførini. Hvat gekk galið hesaferð?

- Tað ber illa til at staðfesta. Ikki annað enn, at vit mugu arbeiða við at betra tann partin av spælinum, helt Levi.

Um komandi umførini vil Levi einki siga, hvørt hann metir Skála hava nakran møguleika at klintra longur upp á stigatalvuni.

- Vit mugu bara taka ein dyst í senn. So fáa vit at síggja, hvussu langt tað kann røkka.

## Kendu seg ikki tryggar

Hóast tað at síggja til tóktist, sum hevði HB tamarhald á støðuni allan seinna hálvleik, so helt Emil N. Leifsson ikki, at teir kendu seg heilt tryggar við støðuna.

– Skála roynir alla tíðina at spæla við, og tí koma teir eisini til sínar kjansir. Ikki fyrr enn vit skora til 3-1, anda vit nakað lættari, men tá minka teir so alt fyri eitt um munin aftur. Tíbetur megna vit so kortini at avgera alt, soleiðis at talan gjørdist um ein ruddiligan sigur.

Og hvat skal til hjá tykkum, um slíkt spæl og slík úrslit skulu koma í hvørjum dysti, heldur enn øðrum hvørjum?

- Hart arbeiði. Vit hava sveiggjað alt ov nógv, og skal tað steðga, so skulu vit til at arbeiða betri í hvørjum tí einasta dysti, helt Emil.